SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Tað gongur tann rætta vegin hjá pápa mínum, og hann kemur aftur til arbeiðis*

*(sonur Fidel Castro)*

**STUTT SAGT**

### Sleppa nú á ting

Tjóðartingið í Nepal hevur samtykt eina nýggja stýrisskipan, sum gevur teimum maoistisku uppreistrarmonnunum sæti í tjóðartinginum. Stýrisskipanin er tó bara galdandi fyribils, og tingið skal sita, til ein nýggj og endalig stýrisskipan er gjørd. Avgerðin at geva maoistunum sæti í tinginum er partur av einari friðarætlan, sum hevur til endamáls at fáa uppreistrarmenninar at leggja vápnini og at umskipa rørsluna til ein politiskan flokk. Seinastu tíggju árini hava minst 12.000 fólk latið lív í samanbrestum millum maoistarnar og myndugleikarnar.

### Hótta Noreg

– Teir norsku hermenninir í Afghanistan eru ikki vælkomnir, tí teir eru okkara fíggindar, sigur Taleban-kommandanturin Abdul Hai við norska sjónvarpið TV2. Hann sigur, at teir útlendsku hermenninir bumba hús og heim hjá tí vanliga fólkinum í Afghanistan og oyðileggja lív teirra. Abdul Hai ávarar norsku stjórnina ímóti at senda fleiri hermenn til Afghanistan. Hann sigur, at afghanar hava ikki álit á teimum útlendsku hermonnunum, sjálvt um teir siga seg vera komnar hagar í friðarørindum.

### Hongdur

Tað er ikki bara í Irak, at deyðadómar verða fullførdir. Í grannalandinum Iran varð ein maður hongdur í gjár, eftir at dómsvaldið hevði funnið hann sekan í at hava burturflutt ein annan mann. Sambært dóminum hevði tann 33 ára gamli burturflytarin tikið hin, sum var 20 ára gamal, og gjørt seg inn á hann á ein ósømiligan hátt, sum ákærin orðaði tað. Higartil í ár eru ellivu fólk hongd í Iran, og hildið verður, at 154 iranar endaðu sínar dagar í gálganum í fjør.

# Castro livir illa



*Sambært spanska blaðnum El País er Fidel Castro illa sjúkur eftir fleiri miseydnaðar skurðviðgerðir*

**Aftan á tríggjar miseydnaðar skurðviðgerðir er kubanski leiðarin so veikur, at hann orkar ikki at eta sjálvur**

Tað siga spanskir læknar, sum hava viðgjørt tann 80 ára gamla leiðaran. Fidel Castro varð fyrstu ferð lagdur undir skurð tann 31. juli í fjør, og síðani hevur hann bara víst seg alment einaferð. Tað var tann 1. oktober, tá hann royndi at sannføra kubanska fólkið um, at hann hevði tað betri. Síðani hevur hann ikki víst seg.

Nú skrivar spanska blaðið El País frá læknum á einum sjúkrahúsi í Madrid, at Castro livir illa. Blaðið veit at siga, at Castro hevur fingið tvær skurðviðgerðir í tjúkktarminum teir seinastu mánaðarnar, men at hann fekk bruna aftaná. Blaðið sigur seg hava tíðindini frá keldum á sjúkrahúsinum, har skurðlæknin José Garcia Sabrido arbeiðir. Fyri einum mánað síðani var hann í Kuba og kannaði Castro.

Sambært keldunum á sjúkrahúsinum er støðan hjá Gastro álvarssom, og útlitin, fyri at hann skal koma seg aftur, eru vánalig, skrivar El País. Keldurnar siga blaðnum, at tað eru 80 prosent sannlíkindi fyri, at tann gamli leiðarin doyr av sjúkuni, sum hann hevur.

### Miseydnaðar viðgerðir

Eftir tí, sum spanska blaðið hevur fingið at vita, fekk Castro bruna í tjúkktarmin seinasta vár. Hann varð lagdur undir skurð, og læknarnir kendu seg noyddar at skera ein fjórðing burtur av tjúkktarminum og endatarminum. Samstundis royndu læknarnir at leggja eitt samband ímillum tjúkktarmin og endatarmin, men tann skurðviðgerðin miseydnaðist. Tí noyddist Castro enn eina ferð á skurðborðið, so læknarnir kundu taka allan tjúkktarmin. Men tann viðgerðin miseydnaðist eisini og hevði við sær, at bruni kom í.

Stutt eftir fekk Castro bruna í gallið. Enn eina ferð varð hann lagdur undir skurð. Hon miseydnaðist í fyrsta umfari, men í øðrum umfari fingu læknarnir hjálp úr Spania, og tá eydnaðist viðgerðin, skrivar El País.

Kubansku myndugleikarnir hava ikki grett orð um støðuna hjá Castro. Teir hava sagt, at stjórnin skuldi koma við einari lýsing av støðuni. Hon er ikki komin enn, og myndugleikarnir hava heldur ikki gjørt viðmerkingar til greinina í spanska blaðnum.

### Ikki krabbamein

Ein diplomatur, sum var hjástaddur, tá nývaldi forsetin í Ekvador bleiv tikin í eið í gjár, skal hava sagt, at Fidel Castro varð fluttur á skurðdeildina á einum sjúkrahúsi í Havana heilar sjey ferðir í síðsta mánað. Sambært diplomatinum vildi skurðurin frá teirri seinastu viðgerðini ikki grógva aftur.

Diplomaturin, sum er úr einum landi, ið hevur gott samband við Kuba, skal hinvegin hava avsannað leysasøgur um, at Castro hevur krabbamein, soleiðis sum amerikanskar keldur vilja vera við. Fyri nøkrum mánaðum síðani segði John Negroponte, at kubanski leiðarin hevði krabbamein, og at hann hevði bara nakrar dagar ella nakrar mánaðir eftir.

Spanski læknin, sum var í Havana og viðgjørdi Castro í síðsta mánað, hevur eisini avsannað, at tann gamli hevur krabbamein. Læknin legði tá afturat, at Castro kundi væl koma fyri seg og taka við landsins leiðslu aftur.

Elsti sonur Castro, Fidel Castro Diaz-Balart, segði við tíðindafólk í Kili um vikuskiftið, at pápin hevur tað betri nú, og hann segði seg vera sannførdan um, at tann gamli leiðarin fór at koma fyri seg.

Síðani Fidel Castro gjørdist sjúkur, hevur bróður hansara, Eaúl Castro, røkt leiðarastarvið. Hann er frammanundan varaforseti og verjumálaráðharri.

# Hava samráðst í loyndum

**Ísrael og Sýrialand samráðast í loyndum um ísraelska afturtøku av Golanherunum, skrivar eitt ísraelskt blað.**

Haaretz vil vera við, at samráðingarnar millum londini byrjaðu longu í 2004, og at umboð fyri londini høvdu seinasta fundin í juli í fjør. Hvar samráðingarnar vóru, veit blaðið ikki, men sigur, at tær vóru einastaðni í Evropa.

Londini eru kortini ikki samd enn. Sýrialand krevur, at teir seinastu ísraelsku hermenninir skulu fara av Golan-herunum innan fimm ár, men Ísrael heldur uppá, at teir skulu verða har 15 ár afturat.

Sambært Haaretz skal Ísrael taka seg aftur til markið, sum tað var undan krígnum í 1967, tá ísraelski herurin hersetti Golanherurnar, men ein trygdargeiri skal skipast fram við markinum.